## Veitslur & Stríð !

Brúdleyp, føðingardagar, sveinagildi, sperlagildi, kokkagildi, vaðansgildi, fullveldisveitsla, sambandsveitsla, javnaðarveitsla, fólkaflokksveitsla, veðragildi, lundaveitslur, reisigildi, polterabend, pensionistaveitsla, TB 110 ára veitsla, lønarhækking, klaverveitslur, dansiveitslur, bygdaball, grannastevnur, bindiklubbaveitslur, firmaveitslur... Veitslur eru stuttligar, men kostnaðarmiklar og strævnar at fyrireika.

Restorffs hevur altíð eitt gott prístilboð og tað er líkamikið hvar í landinum veitslan verður hildin. Vit koyra vøruna út og koma eftir tómum kassum.

Latið Restorffs gera veitsluna bíligari og lættari!

Restorffs tlf. 314728

The National Brewery Since 1849


## Klaksvíkar Sjúkrahús
Umsjónarmaðurin

# Røntgendeildin

Hjálparfólk søkist til røntgendeildina á Klaksvíkar Sjúkrahúsi frá 1. mars 2002.

Talan er um avloysarastarv uppá 0,5 tíð í eitt ár.

Umframt registrering og arkivering av kanningum, gjørdar her, umfatar starvið nakað av fyrifallandi arbeiði.

Kunning til teldu og skrivimaskinu ynskiligt, men tó ongin treyt.

Løn og setunarviðurskifti sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Umsókn við møguligum ummælum skulu sendast til:

**Umsjónarmannin**
Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík

**Umsóknarfreist 01.02.2002.**

# Útbjóðing

Vegna Fuglafjarðar kommunu verður betongarbeiðið viðv. brúgv um Skarðsá (við Lonina) boðin út í almennari útbjóðing.

Lisitatiónin verður í Býráðshúsinum í Fuglafirði tann 29. januar 2002 kl. 14.00, og kunnu teir, ið boðið hava verða hjástaddir.

Útbjóðingartilfar kann bíleggjast hjá Fuglafjarðar kommunu, tlf. 444006 móti veðhaldi kr. 2.500,- sum verður at gjalda inn á konto í Føroya Banka nr. 6460 2205965.

Fuglafjørður, tann 2. januar 2002

**Fuglafjarðar kommuna**
**Tekniska deild**


team 85 • 316511

## Bókhaldstrupulleikar?

Vit átaka okkum bókhaldsarbeiði fyri fyritøkur og stovnar

Hetta umfatar m.a. hesar uppgávur:

- Fíggjarbókhald
- MVG uppgerð
- Fakturering
- Debitorrøkt
- Kreditorrøkt

Áhugað kunnu venda sær til:
Knút P. Jacobsen á tel 350 300 ella tel 228 486

KERVI
teld & tøkni

Heykavegur 2, P.O. Boks 3202, FO-110 Tórshavn
tel 350300, fax 350301, e-mail:info@kervi.com, www.kervi.com


TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Grundskeið í sveising

## 11. - 15. februar 2002

Skeiðið umfatar: Ástøðisliga og handaliga undirvísing innan gass-, elektrodu- og TIG-sveising.

Skeiðleiðarar: Bjarni Olsen og Jeffri Olsen, Tekniski Skúlin í Tórshavn.

Skeiðkostnaður: kr. 4.000,- (skal gjaldast við tilmelding)

Tilmelding: **áðrenn 5. februar 2002.**

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Mentamálastýrið og Vitan fáast á skúlanum.

Boðað verður frá luttøku við at venda sær til skúlan á tlf. 318831 (mánadag - fríggjadag, kl. 8-12 & 13-16)

**Tekniski Skúlin í Tórshavn/**
**Skeiðsdepilin við Marknagil**
e-mail: mb@hsh.fo

# Lastbilur til sølu

Scania 142 við skiftilast bíliga til sølu.

**Tlf. 213220**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Dagrøktari í Kollafirði

Til dagrøktina í Kollafirði verður søkt eftir dagrøktara.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Elnu Árting leiðara á tlf. 421375 ella 224827, ella Katrin Petersen samskipara á tlf. 315160.

**Umsóknir**
skulu vera dagrøktini, v/Elnu Árting, FO 410 Kollafirði í hendi í seinasta lagi 4. februar.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Stuðulspedagogar til stuðulsliðið í Tórshavnar kommunu

Stuðulsfólkaskipanin í Tórshavnar kommunu søkir eftir stuðulspedagogum til báðar deildir at byrja skjótast gjørligt.

**Serdeildin**
Søkt verður eftir 2 stuðlum seinnapartin: 25 tímar til 11 ára gamla gentu og 20 tímar til 17 ára gamlan drong í Bridgehúsinum.

Bridgehúsið er eitt stuðulstiltak fyri børn og ung í skúlaaldri, ið eru tarnaði orsaka av breki ella sjúku.

**Familjudeildin**
Eisini verður søkt eftir fólki til familjudeildina, sum tekur sær av børnum og ungum, ið hava aðrar trupulleikar.

Talan er um størri og smærri uppgávur, sum at stimbra trivnað og menning í gerandisdegnum á dagstovni ella at stuðla børnum og familjum, ið eru fyri vansorgan.

Starvið kann vera fulltíðar ella parttíðar starv.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er:
- at umsøkjararnir hava royndir við børnum og innan tað sosialpedagogiska arbeiðsøkið.
- at viðkomandi hevur hug og evni til at arbeiða við børnum og familjum, ið hava trupulleikar.
- at umsøkjarin er búgvin, torir at tosa um forðingar í arbeiðnum og er opin fyri menning í arbeiðnum.

**Starvs- og setunarviðurskifti**
Stuðlarnir verða settir í stuðulsliðið at loysa eina ella fleiri uppgávur. Sum liður í arbeiðnum verður skipað fyri ráðgeving og skeiðvirksemi. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Honnu Jacobsen, leiðara í Stuðulsfólkaskipanini ella Birgit Debess, pedagogiskan ráðgeva. Tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi sum skjótast ella í seinasta lagi 2. februar 2002. Viðmerk umsóknina " Stuðulspedagogur"

SNARSKIVAN



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**TIL SØLU**
Chervolet Blazer 4x4, 6,2 V8 diesel, árg. 90, til sølu.
*Tlf. 250919*

**HYUNDAI ELANTRA**
1600, koksgrátt metallakk, koyrt 12.000 km, árg. okt. 2000, eyka alu sportsfelgur + eyka felgur til vetrardekk, Blaupunkt discannlegg. Nýprísur kr. 160.000,- til sølu fyri hægsta boð yvir kr. 100.000,-.
*Tlf. 215214*

**SUMMARDEKK TIL SØLU**
Nýggj summardekk Pirelli P6000, stødd 195/65-15, til sølu.
*Tlf. 214620*

**ÚTSTOYT TIL SØLU**
Nýtt komplet útstoyt, til Toyota Corolla árg. '87, til sølu fyri 1500 kr.
*Tlf. 310310*

**FORD SIERRA**
Ford Sierra 1.6 Árg. '87, st.car, 165.000 km. Koyrir væl. Til sølu fyri 6.000,-
*Tlf. 252889*

**BMW 3 SERIA**
4 originalar 15" sportsfelgur við dekkum til sølu fyri 4.500 kr.
*Tlf. 251218*

**EYKALUTIR**
til Toyota Hiace diesel, árg. 90-95, til sølu.
*Tlf. 227922*

**EYKALUTIR**
til Toyota Carina St 171, árg. 88-91: Hurðar, síðurútar, bakrútur, spegl, startari, drívaksil og sentrallás til sølu.
*Tlf. 227922*

**TIL SØLU**
Toyota Corolla DX 1,3, árg. 86, til sølu sum eykalutir.
*Tlf. 218860 / 227759*

**TIL SØLU**
14 mðr. gamal Ford Focus til sølu.
*Tlf. 447234 - 221755*

**FORD ESCORT 1,6**
árg. 7/97, í góðum standi, til sølu.
*Tlf. 316814*

**VW GOLF 1,8**
árg. 88, sýnaður 18. juli 01, til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 210246*

**OPEL CORSA 1.2 16V**
gráur, árg. 4/2000. Edition 100, fýra hurðar, koyrt 25.000 km, til sølu fyri 83.000 kr. vegna flyting.
*Tlf. 319922*

**MAZDA 323 16 GTI**
til sølu.
*Tlf. 448423 - 220949*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
*(set X)* undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ .......................... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.***

Sent hevur:
Navn:..............................................
Bústaður:..........................................
Bygd/býur:.........................................
Tlf.: ............

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

**DEKK TIL SØLU**
Fýra spildurnýggj vetrardekk, stødd 205 R 16, sum kunnu píkast, kostnaður 2.000 kr.
*Tlf. 318055*

**NISSAN BLUEBIRD 2.0**
st. car, árg. 87, nýsýnaður, til sølu fyri 12.000 kr.
*Tlf. 253242*

**TOYOTA CARINA II GLI**
árg. 1987, í góðum standi, koyrt 102.000 km. Til sølu fyri 25.000 kr.
*Tlf. 222271*

**NISSAN PATROL**
árg. 3/96, koyrt 143.000 km, til sølu. Annar bilur kann ganga inn í keypið.
*Tlf. 227827*

**TIL SØLU**
Eykalutir til Opel Rekord 2,0 s.s. forlyktir, bakljós, kølari, baklúka, bakrútur, sleipikrókur, útstoyt, felgur, dekk v.m.
*Tlf. 223527*

**TIL SØLU**
Ein Opel Ascona 1,6S, árg. 86, til sølu sum eykalutir fyri 3.000 kr. Ein Suzuki Swift 1,0 Speed, árg. 86, til sølu. Sýnaður í nov. 01. Hevur motorbrek.
*Tlf. 251240 / 261433, e. kl. 17*

**HURÐAR TIL NISSAN SUNNY**
Er tað nakar sum hevur 2 høgra hurðar til ein Nissan Sunny N13, árg. 89 at selja mær.
*Ring 317376*

**HONDA ACCORD 1,8i LS**
frá 8/00, koyrt 39.000 km, við sportsfelgum + píkadekk á felgum, til sølu.
*Tlf. 421585*

**TIL SØLU**
Fýra dekk á felgum við skálum til Mazda 323, lítið brúkt. Merki: Tyfon Euro snow 155/80 R13.
*Tlf. 224259 e. kl. 18*

**YNSKIST**
Tvørbjálki framman, til ein Mazda 323 sedan, árg. 1989, ynskist bíliga til keyps.
*Tlf. 441680 e. kl. 18*

**FORD ESCORT**
diesel, 1,8, til sølu.
*Tlf. 216626, e. kl. 16*

**FORD ORION**
árg. 85, uttan plátur, bíliga til sølu.
*Tlf. 313252*

**TOYOTA DYNA 300**
árg. 87, km 143.000 v/Effer 3,5 tons krana bíliga til sølu.
*Tlf. 213056*

**BILUR TIL SØLU**
Ein sera vælhildin Opel Astra st. car 2000 diesel, við sóltaki, árg. 8/2001, er rustviðgjørdur. Til sølu fyri 195.000 incl. 4 nýggj píkadekk við felgum og sportfelgum o.a.
*Ringið 424567 ella 250413*

**HONDA ACCORD TIL SØLU**
Honda Accord 1.8 i LS, árg. november '99. 4 x Airbag, servostýring, el-rútar, el-spegl, fjarstýrt sentrallás, Pioneer stereoanlegg, tokulyktir, frontspoilara, alufelgur, píkadekk, 47.000 km.
*Tlf. 226022*

**TOYOTA COROLLA**
frá 6/92 til sølu. Sær gott út og er í góðum standi. Sportfelgur fylgja við.
*Tlf. 448518 ella 227770*

**OPEL ASTRA 2.0i**
diesel, árg. 12/97, koyrt 60.000 km, í góðum standi, til sølu.
*Tlf. 260522 - 224808 - 310614*

**OPEL ASCONA**
árg. 87 til sølu fyri 2.000 kr. til eykalutir.
*Tlf. 447207 ella 217207*

**EYKALUTIR TIL MAZDA**
Eykalutir til Mazda 323, árg. 87-89, 3 hurðar, alt kann brúkast.
*Tlf. 251439*

**FORD MOTORUR**
Eg leiti eftir einum Ford Escort motori. Kanst tú hjálpa mær, so ring á
*tlf. 226662*

**TIL SØLU**
Fýra alufelgur v/ 4 holum, 100 mm v/ dekkum, 195/50-75, lítið brúkt, til sølu fyri 4.000 kr.
*Tlf. 223370 ella 311598, e. kl. 17*

**MAZDA 323,, 1300**
Árg. '85, koyrir væl, til sølu fyri 4.000 kr.
*Tlf. 224594*

**TIL SØLU**
Vælhildin Opel Astra I stationcar, reyður, til sølu. Árg.10/97. Koyrt 33.500 km.
*Telefon 457226*

**MAZDA 2,0 I**
árg. 09/86, sýnaður 18. juli 2001, til sølu fyri 12.000 kr. Hevur sportsfelgur við nýggjum dekkum. Koyrir væl og sær gott út.
*Tlf. 255459*

## Amboð

**TIL SØLU**
Elektromotorur v/ viftu og blásara. Kann brúkast til hoyturking v.m.
*Tlf. 223527*

## Arbeiði

**HÚSPLÁSS**
Álítandi genta, ið ikki roykir, søkist at ansa 2 dreingjum á 3 ár og 4 mðr. skjótast til ber. Løn eftir avtalu.
*Tlf 312002/ 212007*

**REINGERÐINGSHJÁLP**
álítandi og húslig kvinna søkist 3 tímar um vikuna.
*Tlf. 316741 e. kl. 18*

**SØKT VERÐUR EFTIR**
álítandi fólki at byrja beinanvegin. Fish & Chips, Vaglið,,
*Tlf. 317405 ella 320220*

**WORK OVER SPRING/SUMMER**
19 year old male from Scotland looking to work over spring/summer in Faroes, willing to work doing anything, mature, honest, friendly, and hardworking young man, interested?
*email kevin04yessa@aol.com*

**HÚSASMÍÐ OG UMVÆLING**
Alt timburarbeiði verður gjørt, nýtt sum gamalt innan og uttan.
Fa. Húsaumvæling,
*tlf. 215214*

## Barnaansing

**GENTA/KONA SØKIST**
Er nakar, sum tímir at spæla við meg? Eg eri ein 14 mðr. gamal drongur, ið sóknast eftir fittari gentu/konu at taka sær av mær vikudagar kl. 8–15.
*Tlf. 321599*

**GENTA/KONA SØKIST**
at ansa eftir tveimum børnum, 1 og 3 ára gomul.
*Tlf. 310431 ella 261435, e. kl. 18*

**GENTA SØKIST**
at ansa eftir 20 mðr. gomlu Sedeu mánadag til fríggjadag frá kl. 8.30 til 16.30, at byrja skjótast gjørligt. Áhugað vinarliga ringi
*Tlf. 218071, Irena*

**HJÁLP**
er tað nakar, sum kann ansa eftir Trygva, 12 mðr. gamal – mánadag-fríggjadag kl. 8-16 – skjótast gjørligt. Vinarliga ring
*319549*

**ERT TÚ**
ein frísk pensioneræð kvinna í Vági? Kundi tú hugsað tær eitt oyra afturat pensiónini? So er her ein upplagdur møguleiki. Vit vænta fyribils ansing til okkara skjótt 9 mánaða gamla son. Hann er sera fryntligur, og etur næstan allan vanligan mat. Hevur tú hug, ella ivast tú og vilt hava meira at vita, so ring ella skriva til okkum!
*Tlf. 374059, Arni Johansen*

**GENTA/KONA**
søkist at ansa eftir 5 ára gomlum drongi í Havn, mánadag-fríggjadag frá kl. 12.30-17.30.
*Tlf. 317574*

**GENTA/KVINNA SØKIST**
18 ár ella eldri, at heinta 6 ára gamlan drong í barnagarði kl. 16.30 og ansa eftir honum til kl. 19.30 aðru hvørja viku og annaðhvørt vikuskifti kl. 8–15.
*Tlf. 310171 - 252610*

## Barnaútgerð

**TIL SØLU**
Myrkabláur Brio barnavognur, sær væl út, til sølu fyri 800 kr. Myrkbláur Simo koyristólur, næstan einki brúktur, til sølu fyri 1.800 kr.
*Tlf. 318189*

**KOYRISTÓLUR TIL SØLU**
av slagnum »Mothercare«, grønur, selar, posi, fótposi og regnslag fylgja við.
*Tlf. 372333*

**TIL SØLU**
Sera vælviðfarin Brio koyristólur við kalesju, regnslag, slag og koyriposa sum hoyrir til, til sølu.
*Tlf. 448656*

**TIL SØLU**
Vælhildin myrkabláur/beige ternutur barnavognur v/ lift og pusslitasku av sama merki, fluguneti og regnslagi, til sølu fyri 3.500 kr. Nýprísur 6.000 kr.
*Tlf. 310323 ella 251223*

## Bátaútgerð

**10-MANNAFAR**
Um hóskandi boð fæst, er eitt 10-mannafar v/ fiskiloyvi til sølu. Útgerð: Ein GBS, tríggjar oljutrýstsnellur, ein elektrisk snella, eitt lit ekkolodd og eitt línuspæl.
*Tlf. 442192 ella 223508*

**TIL SØLU**
28 fót Selfa útróðrarbátur við allari útgerð og fiskiloyvi A, til sølu. Hevur nýggjan 200 HK Volvo motor.
*Tlf. 373997*

**SNELLUR OG LÍNUSPÆL**
2 hálvautomatiskar snellur (oljutrýst) og eitt línuspæl bíliga til sølu.
*Tlf. 332369*

**LÍNURENNA**
Dupult línurenna úr rustfríum stáli til sølu.
*Tlf. 455411*

**BÁTAMOTORUR TIL SØLU**
Volvo Penta bátamotorur av merkinum TAD 31 til sølu. 105 HK.
*Tlf. 448628, e. kl. 19*

**TIL SØLU**
Ein Møn Fisherman, 30 fót, til sølu, um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 220632 ella 441035*

## Bingo

**BINGO**
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 26. januar kl. 16.
*Eldrafelagið Borgin*

**GOTT BINGO**
verður í B36 húsinum mánakvøldið 21. jan. kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Á lutaseðli 3 x 1.000 kr. Eykaspæl. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Spastikarafelagið*

**GOTT BINGO**
verður í Róðrarneystinum á Argjum hóskvøldið 7. febr. kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar.
*Argja Bóltfelag*

**AB-STUÐLAR**
skipa fyri góðum bingo í neystinum hjá Argja Róðrarfelag hóskvøldið 24. januar kl. 19. Nógvir góðir vinningar: Føroyskt krov, 15 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*AB-Stuðlar*

**BINGO**
verður í Stórhúshøll leygardagin 19. januar kl. 16.
*ÍF*

**KAGGIN**
Gott bingo verður leygarkvøldið 26. jan. kl. 19.00. 15 vinningar á lutaseðli, m.a. tvey gávukort á 1.000 kr. Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl.
*Kaggin*

**SUÐUROYINGAR**
Gott bingo verður í Trongisvági mánakvøldið 28. januar kl. 19.00
*Tvøroyrar Svimjifelag*

**FRÁ EYDNUNI**
Gott bingo verður sunnudagin 20. jan. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1.000 kr. Eykaspælið 800 kr. Drigið verður millum spølini.
*Eydnan*

## Bøkur

**TIL SØLU**
Nakrar føroyskar bøkur til sølu vegna plásstrot.
*Tlf. 316249*

## Burturm. /funnið

**SVØRT KANIN**
Um nakar saknar eina svarta kanin við hvítum labbum, so er bara at ringja til mín. Hon er funnin á Argjum.
*Tlf. 253540 ella 310781*

**BURTURBLIVIÐ**
Svartur leðurjakki til konufólk burturblivin í Kagganum 22. des. Í lummanum var lyklatyssi við navninum »Mirjam« á. Vinarliga ring
*Tlf. 75141021 í Danmark*

**BURTURMIST**
Eitt Seiko damu gull ur burturmist í Havn, møguliga í SMS 20. des. ella á Kongabrúnni. Finningarløn verður givin.
*Tlf. 313763*

**BURTURMIST**
Lyklaringur við tveimum lyklum burturmist nýggjársaftan á strekkinum Krossgøta-Gálgasteinur. Hevur nakar funnið lyklarnar, vinarliga ring
*Tlf. 311242*

**BURTURMIST**
Playstation 2 spæl »Fifa 2002« burturmist uttan fyri SMS (Apotekið) 28. des. Tann, ið hevur funnið spælið, vinarliga ring
*Tlf. 317299 ella 257972*

## Býli

**KAMAR TIL LEIGU**
við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu. Til fólk, ið ikki roykir.
*Tlf. 313865*